# mum ungu



*Ungdómspolitiski bólkurin, sum Annlis Bjarkhamar, fyrrverandi landsstýriskvinna, tók sær av, hevði nógv góð hugskot, sum tað nú verður arbeitt víðari við*

Listaskálin eru fullkomiliga "lukkað land" fyri ungdóminum, og vit noyðast at gera teir røttu karmarnar fyri at halda skapandi ungdóminum til, siga tey trý.

## Náttarbuss

Eitt annað, ið mangan hevur verið ført fram, er, at tørvur er á einum náttarbussi í Havn. Í flestu størru býum í Danmark er skipan við náttarbussi, har tað er møguligt hjá ungum, sum búgva uttan fyri miðbýin, at koyra við bussi heim á miðjari nátt.

Hetta halda tey ungu hevði verið eitt hugskot at sett á stovn í Føroyum, tí hetta hevði forða fyri, at ung til dømis koyrdu ávirkað á prutlum, og foreldrini høvdu ivaleyst kent seg væl tryggari, um tey vistu, at ein náttarbussur var, ið kundu koyra børnini hjá teimum til hús.

Fleiri onnur hugskot eru løgd fram fyri býráðið, og nú er so bert eftir at vita, hvat kemur burturúr. Fyriskipararnir av ungdómsráðstevnuni siga seg vænta, at tað í hesum førinum verður lurtað eftir ungdóminum, sum hevur nógv at bjóða.

teir tríggir fyrireikararnir av ráðstevnuni. Tey halda tí, at tað er av sera stórum týdningi, at vit leggja okkum eina við at lurta betur eftir teimum ungu.

## Nógvir fordómar

Sambært teimum trimum pedagogunum er ein afturvendandi trupulleiki í sambandi við tey ungu, at tað eru so nógvir fordómar mótvegis teimum ungu í dag.

- Tey ungu møta fordómum allastaðnis. Allar ræðusøgurnar um tey ungu koma fram í miðlunum, og tað er við til at halda lív í teimum mongu fordómunum. Margarinfabrikkin er eitt savningarstað fyri ung í Havn, og fordómarnir móti staðnum er øgiligir, sigur Bogi Andreassen, leiðari á Margarinfabrikkini.

Hann heldur, at hesir fordómar einki hald hava, tí tey allarflestu av teimum ungu eru stak fitt og løtt at hava við at gera. Sjálvsagt eru nøkur undantøk, men soleiðis vil altíð verða, sigur hann.

Bæði Bogi Andreassen og tær báðar Salua Manai og Alisa Hammer halda, at tað er stórur tørvur á einum veristaði fyri tí eldra bólkinum av teimum ungu. Tað vil siga teimum, sum eru kanska 16 ár og eldri.

Á ráðstevnuni kom eitt uppskot fram um at gera Vertshúsið til eitt veristað hjá ungdóminum í Havn, har møguleiki var fyri bæði kafé og spælistað.

Tey halda eisini, at tað er ógvuliga óheppið, at Margarinfabrikkin liggur í miðbýnum í Havn, tí tey flestu av teimum ungu búgva í útjaðaranum, og miðbýurin hevur eitt rættuliga keðiligt umdømi.

Ein annar vansi við plaseringini av Margarinfabrikkini er tað, at veristaðið liggur mitt ímillum fleiri ølklubbar og skeinkistøð.

- Tá ið Margarinfabrikkin í vikuskiftinum steingir um eitt-tíðina, ganga tey ungu ofta og vála eina góða løtu, áðrenn tey fara til hús. Tá koma tey ofta framvið skeinkistøðunum, har tey bæði kunnu møta freistingum og eisini vaksnum persónum, ið tey kenna væl, sum eru dýrandi fullir, og tað er óheppið, siga teir tríggir pedagogarnir.

## Kommunan er positiv

Eftir at ráðstevnan er farin aftur um bak, verður nú arbeitt víðari við, hvussu summi av teimum uppskotum, ið sóu dagsins ljós á ráðstevnuni, kunnu gerast veruleiki.

Sambært teimum trimum fyrireikarunum er Tórshavnar Kommuna ógvuliga positiv og opin fyri nýhugsan, og fundast hevur eisini verið um, hvussu man kemur víðari.

- Vit hava møtt góðum vilja frá kommununi, og so vóna vit, at okkurt av uppskotunum skjótt kann síggjast aftur í verki, sigur Alisa Hammer.

Millum tey uppskot, ið ungdómurin kom við á ráðstevnuni, er millum annað ein opin verkstaður til myndlist og aðra list.

- Ungdómurin er ótrúliga skapandi, men karmarnir fyri skapandi list millum ung eru als ikki nøktandi. Bæði Norðurlandahúsið og



*Eisini varð nógv dansað á ráðstevnuni, og tey ungu sóknast eftir einum stað, har tey hava umstøður at venja dans, og har skipast kann fyri dansiskeiðum.*